gult cyan magenta svart

Tí›indaskriv frá Plátufelagnum Tutl:

N‡ggj tvífløga vi› skjaldrum, ramsum og rímum

“Nina, nina, nái” er heiti› á eini n‡ggjari tvífløgu, i› Plátufelagi› Tutl gevur út. Á útgávuni eru ikki færri enn 145 n‡ggjar og gamlar savnsupptøkur vi› skjaldrum, teljiramsum, rímum o.ø., i› hevur tilkn‡ti til børn. Eitt nú eru eisini upptøkur vi› ljó›i frá látipípum, grasstráum, eini snurru og einum fja›urlási. Elstu upptøkurnar eru frá 1927 og tær n‡ggjastu vór›u gjørdar í ár.

Fjølbroytt úrval

Útgávan er ein brei› mynd av hvussu skjaldur og ramsur hava ljó›a› og enn ljó›a ymsasta›ni í landinum og hon er m.a. ætla› øllum teimum, i› hava hug at læra seg at syngja nøkur skjaldur ella bera fram nakrar teljiramsur. Nógv av ungu foreldrunum í dag, eru uppvaksin uttan beinlei›is samband vi› skjaldrini, og summi hava kanska leita› seg fram á tey í bókum, sum í teirri frálíku “Í Sk‡mingini” hjá Sofíu Petersen og Elinborg Lützen. Men í bókunum finnur tú ey›sæ› eingi løg til skjaldrini, og hóast onkur kanska vil halda at løgini eru so einføld at ein og hvør bara kann finna uppá sjálvur, so munnu mong hava aftra› seg vi› at sungi› fyri børnunum hjá sær. Ø›rvísi er ta›, tá i› tú hevur eina upptøku at sty›ja teg at, og mong hava havt stóra gle›i av teimum ikki so heilt fáu skjaldraupptøkum, sum longu eru útkomnar, t.d. sum partur av barnafløgunum hjá Tutl og í n‡ligu sendingunum “Likkulikkuleia”. Ta› er tó einki at ivast í, at henda útgávan, sum er halga› skjaldrunum fyrst og fremst, fer at geva eitt nógv brei›ari og fjølbroyttari úrval, samstundis sum hon eisini t‡ iliga vísir at “hvør fuglur syngur vi› sínum nevi” og at ta› er ógvuliga ymiskt sum fólk velja at bera skjaldrini fram. So, sum heild má sigast, at hetta er ein gó›ur møguleiki hjá hvørjum tí sum vil ogna sær lut í hesum partinum av okkara mentanararvi. Eitt nú kann hon vera avbera hent hjá skúlalærarum, námsfrø›ingum og ø›rum, i› hava hug at n‡ta skjaldur og ramsur í sínum arbei›i. Vi› sjálvum fløgunum fylgir ein bóklingur upp á 60 sí›ur vi› tekstum, vi›merkingum og myndum.

Heimildarfólk

Tey, i› syngja á útgávuni, eru Wilhelmina Larsen úr Dali, Sigrid Simonsen av Kirkju, Zacharias Jakobsen úr Hattarvík, Kristina Bolstad úr Sandvík, Hans Dalsgaard, Jógvan, Pætur og Leifur Tróndarsynir úr Skálavík, Anna í Havursgar›i úr Kvívík, Axel Tórgar› úr Havn, Maria Eide Petersen, Jóhanna Maria Skylv Hansen, Sigmundur í Bú›, Sigmundur í Lon, Marianna í Kongsstovu og Elsuba í Króki úr Nólsoy, Jakob Heinesen úr Tjørnuvík, Nicolina Højgaard úr Rituvík, Lena Dahl og Henny Davidsen av Toftum, Poul Schrøter úr Hvalba, Jacob Petur Symphor og Albert Djurhuus úr Sumba, Jóhan Adolf Petersen úr Nor›depli, Kirstin Henriksen av Strondum, Jákup Berg úr Hovi, William Kornus Jóanesarson úr Funningi, Sámal Petur Hansen úr Funningsfir›i, Maria Danielsen av Velbasta›, Bjarni Mohr úr Hoyvík og onnur.

Tey, i› gjørdu upptøkurnar á fløgunum, eru Birgitta Hylin, Ólavur Hátún, Mortan Nolsøe, Helgi Jacobsen, Danmarks Radio, Thorkild Knudsen, Hakon Grüner-Nielsen, Jóhan Hendrik Winther Poulsen, Jacob Aagotnes, Jóannes Dalsgaard, Viggo Dalsgaard, Brynolf Lamhauge og Kári Sverrisson. Flestar av upptøkurnar eru fingnar til vega frá Føroyamálsdeildini á Fró›skaparsetrinum.

Ta› er Kári Sverrisson, i› hevur lagt útgávuna til rættis, hon er prenta› í T‡sklandi og kostar 199 kr.

VI‹MERKINGAR

Fullveldi, so samrá›ing

Mannbjørn Jacobsen

Vi› seinastu samrá›ing millum føroyska landst‡ri og dansku stjórnina, umbo›a› av Nyrup, sum sum statsmálará›harri hevur føroysk mál undir sær, sær samrá›ingarlei›in fyribils út til at vera uppbrúkt. Hon var ikki so óhugsandi sum summi høvdu hug at gera hana til. Helst skuldi henda lei› farast um í sátt og semju vi› hin partin í málinum, okkara samríkisveldi Danmark. Fyri dansku stjórnina kann hetta mál bara kennast ke›iligt, sum hon ø›rumegin tambar út í tí› fyri, at stimbra a›rar fyrr kendar kreftir fram í Føroyum, hinvegin hvessir av vi› servi›ger› av landsst‡rismonnum á óvanliga fjasutum gistingarhúsum. Teir hava sjálvir fult av álvarsmálum fyri, so hetta tykist líti›, ma. júst framfarna atkvø›an um fráfaringina frá krónini til fyrimuns fyri eitt europeiskt gjaldoyra. Øll vi›ger›in av málinum líkist tí hjá føroyingum vi› tí muni, at danir skulu takast inn í eina størri felagseind á altjó›a grundarlagi, føroyingar tykist á veg úr einari størri, tí vi› teimum, í eina minni felagseind á tjó›skaparligum grundarlag. Tey sjónarmi› føroysk umbo› føra fram líkjast teimum, danir á hini sí›uni í gjaldoyrismálinum føra fram, vandi fyri var›veitslu av tjó›skaparligu ey›kennunum og valdinum í landinum. Ni›ri ver›ur lokka› vi› ikki nærri náhvamt grunda›um fyrimunum vi› størri eind, ella mótstø›a ver›ur flent burtur sum líti›sigandi, frá líti›sigandi fólki. Hetta ber ikki so væl til yvirfyri fremstu umbo›smonnunum fyri møguliga anna› komandi land, enn kn‡tt at teimum. Her er betur vi› blí›skapi og fyrikomandi tosi, vi› hondini afturum ryggin vi› búskaparligari høttan. T‡dningarmesta grundin til skifti› hjá mi›flokkunum frá høgrastjórnini hjá Slüter yvir á sosialdemokratarnir aftur var helst júst vónin um, at hon betur var før fyri, at losa veljarinir inn í EU, enn ein stjórn, sum bara plága›i stóran part av hesum veljarum vi› asosialum ni›urskur›politikki, sum teir høvdu varhugan av, at veljarinir hevndu seg aftur inná vi› at atkvø›a ímóti til EU atkvø›urnar. Tá vóru politikkarnir ikki uppá val, veljarnir vóru solei›is sæ› ábyrgdarleysir. Hetta eydna›ist ikki hesafer› vi› euruatkvø›uni, og skelkandi, serliga nógv vóru á vali, og úrsliti› grei›ari enn væntan›. Føroyska kravi› er komi› illa vi› her.

Nógv ger máli› trupult, tí Nyrup far ikki fatur á einari samdari sambandssí›u sum fyrr og í stjórnførum standi. Javna›arflokkurin undir Eidisgaard setur egi› uppskot fram um sjálvst‡ri innanfyri ríkisfelagskap, sum sambandsflokkurin hægst kann feta seg eftir. Egnu sjónarmi› fer hann lí›andi frá fyri ikki, at gera seg ómøguligar sum samgonguflokk hjá einum javna›arflokki, enn fyri ríkisfelagsskapi, og enn dyggasta trygd fyri honum. Fólkaflokkin, sum meiri nátúrligan samstarvsfelaga, hava teir fyribils uppgivi› undir Anfinn Kallsberg.

Sambandskreftirnar hava annars fingi› ókeypis hjálp frá ikki sjálvsagdari sí›u, frá í hvussu so er fyrrverandi ytsta vinstravongi, sum er vor›in arbei›sleysur politiskt, og finnur seg onki at meina solei›is sæ›, so teir líka so væl kunnu vátta trú›vir›i í størvum, sum annars ikki vóru.

Fjálga› vi› hesari óvanta›a stu›linum, at vísa seg marksistisk, kommunistisk mótstø›a móti fullveldi, frá fólki sum er bangi› fyri vi›skiftisfólki, sum í heimloysi, tí sovjetskipanin bráddliga fall saman, vístu seg at vera, ella eru gjørd til, vanliga lógleys, hevur danska stjórnin hildi› fast vi› skiftisstí› uppá 4 ár, sum ikki ver›ur mett at standa seg í einari atkvø›u um fullveldi. Ætlanin er so, at landst‡ri› skal sigla á land í hesi roynd, fara frá, og sambandslandst‡ri ísta›in, ella vatna máli› so nógv út, at líti› og onki hendir.

Somu trupuleikar kunnu illa komast uttanum, sum í samrá›ingunum millum føroyskar myndugleikar og danskar um kreppuna fyrst í 1990 áunum, um enn føroyska sí›an helst er lærd av royndum. Hinvegin er einvegis donsk hond, ta› er jú danska statin, tosa› ver›ur vi›. Hinumegna umbo› fyri, á pápírinum í hvussu so er, ásameiniligar kreftir frá høgru, í mi›juni og vinstru, sum, tykjast danir at halda, mugu kenna seg at hava avmarka›ar heimildir. Hetta liggur helst aftanfyri danska tosi› um at “føroyska fólki›” eina skal rá›a her. danska stjórnin vónar sjálvandi, at undir hóskandi hóttandi fyritreytum fer føroyska fólki› onkusvegna at vísa fullveldiskravinum aftur, og benda gongdini inn í javna›armøguleikan, sum er yvirtøkur innan verandi ríkisfelagsskapskarm eftir búskaparligum førimuni. Onki n‡tt er vi› tí. Ta› er næstan ætlanin vi› heimast‡rislóguni, sum nú bara ver›ur kalla› Sjálvst‡rislóg. Hetta er ta›, hetta landsst‡ri› ætlar at koma uttanum, at onki hendir. Stjórmskipannarmáli› er l‡st at vera høvu›uppgávan valskei›i› út. At fari› frá og lata sambandsmøguleikan komi› framat og fingi› eina skipan vi› dansku stjórnina, sum líkist teirra, tó innanfyri ríkisfelagsskapsheiti›, er bæ›i ótolandi og politisk mátt-loysisgerandi fyri allan andan í og stovningini av vi›komandi flokkum. Hetta hóttir stø›ugt.

Sami trupuleiki sum í 1946 vísir seg vi› føroyskum statslíknandi umbo›um, sum danska stjórnin, ikki úttala›, metir kollveltingarlig. Td. ST uppíløgu. Allir vegir vísir ein gordiskur knútur seg, sum Nyrup lætt kann brúka. Hann er helst vanur vi› meiri fløkt mál enn hetta í taktiskum evnum í uppger› vi› stø›ugt sterkari og sjálvstyrkjandi sitandi høgra og mi›samgonguna frá 1980 árunum í Danmark og uppger› innanh‡sis í flokkinum, har hann eisini klára›i eina trupla uppgávu, at koyra ein vælinnkoyrdan og eldhuga›an formann frá fyri vantandi trú›vir›i. Hetta seinasta er neyvan brúkiligt yvirfyri føroysku umbo›unum, sum ma. umbo›a føroyska konservativa flokkin, men royndir eru gjørdar ví›a um á donskum arbei›splássum og vi› hjálp av onkrum sjálvtilnevndum, møguliga ókeypis, føroyskum hjálparmanni í hóslag vi› danskar hjálandahuga›ar afturhaldskreftir.

Eisini eru teir í fer› vi› eina n‡ggja grundlóg, har ein uniónsskipan skal geras vi› Grønlandi vi›. Føroysku ynskini lagast illa inn her. Teir stúra helst eisini fyri møguligari føroyskari ávirkan inn á grønlensku politiskt búskaparligu menningina, sum helst er ógrunda›. Grønlendingar hava ikki sett loysingar ella fullveldisætlanir fram.

Eitt ókeypis, sum hjálpir dønum, eru ymiskt uppskot um atkvø›u, har summar skulu ver›a ikki bindandi, hvat ta› so t‡ ir, so føroyingar undirskunda›ir av loysingarmonnum koma at atkvø›a fyri uppskotinum, sum fall í 1946, so alt krav er falli› burtur á loysingarlei›. Hetta er ein fella í atkvø›u nú til várs, um ikki ver›ur hugsa› nóg væl um.

Best er at seta fullveldi› fyrst, føroyskar fyribils statsstovnar, fáa vi›urkenning mest møguligt fyri hesum uttanlanda, so samrá›ast vi› dansku stjórnina. Munurin ver›ur frá næmingi til lærara. Hitt er longu nú vor›i› ov nógv dansur vi› sama felagi uppí saman sum ikki vil naka›.

Kanska er ta› ta›, danska stjórnin ætlar, nú hom heldur hánt um føroyskan vilja til, at ganga søguligum si›bundnum kenslum á møti, var›veislu av felags kongahúsi, krónuni, so krøv bara linka frá føroyskari sí›u, uttan at naka› er fráfari› frá uppruna taktiskum stigi frá hinari sí›u. Danski staturin, herna›urin, hjálandahugsanir søguliga, eru so nær kn‡ttar at tí, at teir vita ikki rættiliga hvat ætlanin er.

Tí›indaskriv

Báran 10 ár

4. des. í ár eru li›in 10 ár sí›ani at Bygdarfelagi› Báran bleiv sett á stovn og í hesum sambandi ver›ur skipa› fyri stórum tiltaki í Skálanum í Klaksvík í vikuskiftinum 9.-10. des.

Á skránni ver›ur nógv spennandi, leygardagin 9. des. kemur TrøllaPætur á vitjan og sunnudagin kemur I Am á pallin, bá›ar dagarnar ver›ur eti og drekkikapping, bá›ar dagarnar ver›ur tombola og tivoli, kostna›urin fyri vaksin er kr. 40,- og fyri børn kr. 20.

Tiltaki› endar sunnukvøldi› uml. kl. 21.15, tá ver›ur eisini drigi› um seld atgongumerkir, atgongumerkini ver›a drigin hvør sær, hjá teim vaksnu er vinningurin 1 gsm-fartelefon hjá børnunum er vinningurin 1 playstyation. Jólamenninir koma á vitjan bá›ar dagarnar.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Arkitektar/byggifrøðingar

til planlegging og málsviðgerð

Á byggi- og býarskipanardeild Tórshavnar kommunu er eitt starv sum arkitektur/planleggari og eitt starv sum málsviðgeri leyst at søkja.

Høvuðsuppgávur

Arkitektur/planlegging:
- útstykkingarætlanir
- lokalplanir
- landslagsplanlegging
- býarplanlegging

Málsviðgeri:
- byggimálsviðgerð
- byggieftirlit
- samskifti við borgarar, feløg og stovnar

Førleikakrøv

Umsøkjararnir skulu verða útbúnir arkitektar, byggifrøðingar ella hava aðra viðkomandi útbúgving.

Skulu duga væl føroyskt í skrift og talu og hava hollan kunnleika til telduforritini MS Office, AutoCad/Microstation GeoOutlook.

Persónligar eginleikar

Umráðandi er, at umsøkjararnir duga væl at leggja arbeiðið til rættis, eru fyrikomandi, kunna arbeiða sjálvstøðugt og eru til reiðar at luttaka í øðrum arbeiði á deildini enn omanfyri nevnt.

Setanarviðurskifti

Størvini verða sett 15. januar 2001 ella skjótast til ber eftir hetta. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Kommunan bjóðar

tvey áhugaverd størv, ið eru fakliga og persónliga mennandi við góðum arbeiðsumstøðum í nýggjum hølum.

Meira fæst at vita

um størvini við at venda sær til Ova Mortensen, býararkitekt, ella Marius Müller, tekniska stjóra, tlf. 31 51 60.

Umsóknir

saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 1. januar 2001. Viðmerk á umsóknina "starv á byggi- og býarskipanardeildini".

Byggi- og býarskipanardeildin er deild undir teknisku fyrisitingini, ið eitt nú umsitur ognir kommununnar, frílendi, byggieftirlit, útstykkingar, planlegging, prosjekt o.a. Á deildini starvast 8 fólk, umframt húsvørðatænastan og frílendisdeildin við 22 fólkum.

SNARSKIVAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

KT-starvsfólk

Tórshavnar kommunu søkir við hesum eftir KT-starvsfólki til KT-deildina.

Nakrar av høvuðsuppgávunum:

- gera kravfestingar í tøttum samstarvi við brúkarar og forritara
- gera brúkaravegleiðingar
- testa skipanir og vera við til at menna tær
- hava neyvt innlit í øðrum skipanum, sum umsitingin brúkar
- veita hjálp í MS-produktum á superbrúkarastøði
- veita hjálp til heimabrúkarar (telefon og á staðnum)
- veita bráðfeingishjálp
- hjálpa til at automatisera arbeiðshættir, har tað er ynskt

Aðrar uppgávur

Saman við hinum á deildini taka eina hond í, tá á stendur. Avloysa hini á deildini.

Førleikakrøv

Neyðugt er at umsøkjarin er útbúgvin datamatikari ella tilsvarandi royndir við Delphi, MS-SQL og onnur Microsoft forrit er ein fyrimunur. Umsøkjarin má vera røkin og duga at arbeiða sjálvstøðugt.

Kommunan bjóðar

eitt áhugavert starv við stórum og fjølbroyttum avbjóðingum. Kommunan bjóðar neyðug skeið.

Setanarviðurskifti

Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála millum TKST og Tórshavnar kommunu. Fyrivarni verður tikið fyri góðkenning frá landsstýri og TKST.

Meira fæst at vita

um starvið við at venda sær til Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, ella Inga Ellingsgaard, KT-leiðara, tlf. 31 51 60.

Umsóknir

saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 22. desember 2000. Viðmerk á umsóknina "KT-starvsfólk".

KT-deildin umsitur alla edv-útgerð hjá Tórshavnar kommunu. Deildin er í støðugari menning við fjølbroyttum uppgávum og avbjóðingum. Í løtuni starvast 4 fólk á deildini.

SNARSKIVAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Verkfrøðingur/byggifrøðingur

til prosjekt/planlegging og málsviðgerð

Á teknisku deild Tórshavnar kommunu er eitt starv sum prosjekt/planlegging og eitt starv sum málsviðgeri leyst at søkja.

Høvuðsuppgávur

Prosjekt/planlegging:
- planlegging og prosjektering av uppgávum, ið deildin umsitir
- eftirlit og samskifti við privat ráðgevandi virki
- luttaka í øðrum uppgávum á deildini

Málsviðgeri:
- málsviðgerð og fyrireika mál til nevndarviðgerð
- samskifta við borgarar, stovnar, virki og onnur
- luttaka í øðrum uppgávum á deildini

Førleikakrøv

Umsøkjararnir skulu verða útbúnir verkfrøðingar, byggifrøðingar ella hava aðra viðkomandi útbúgving.

Skulu duga væl føroyskt í skrift og talu og hava hollan kunnleika til telduforritini MS Office, Microstation GeoOutlook/AutoCad.

Persónligar eginleikar

Umráðandi er, at umsøkjararnir duga væl at leggja arbeiðið til rættis, eru fyrikomandi, kunna arbeiða sjálvstøðugt og eru til reiðar at luttaka í øðrum arbeiði á deildini enn omanfyri nevnt.

Setanarviðurskifti

Størvini verða sett 15. januar 2001 ella skjótast til ber eftir hetta. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita

um størvini við at venda sær til Boða Haraldson, býarverkfrøðing, ella Marius Müller, tekniska stjóra, tlf. 31 51 60.

Umsóknir

saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 1. januar 2001. Viðmerk á umsóknina "starv á teknisku deild".

Tekniska deild er deild undir teknisku fyrisitingini ið eitt nú umsitur vegir og gøtur, veitingar, heilsu- og umhvørvismál, ferðsluviðurskifti, bussleið o.a. Á teknisku deild starvast 7 fólk, umframt vatn- og gøtuljós, vegdeildin og reinhaldið við uml. 54 fólkum.

SNARSKIVAN

www.sosialurin.fo